H71 Kyndil: 22 – 29 (9–15)

Gongur framá hjá Kyndli

Eftir eina sera laka byrjan upp á kappingarári› tykist Kyndil nú at vera á veg upp eftir stigatalvuni. Sunnudagin var› H71 sent sent stigaleyst ni›an í Hoyvíkingina

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Eftir at teir fytrstu umførini áv landskappingini hava havt stórar trupulleikar av at koma ígongd, tykist ta› nú at ganga rætta vegin hjá Kyndli.

Undanfarna vikuskifti vóru teir meira enn nær vi› at basa strandingum, og sunnudagin bygdu teir ví›ari á tey positivu elementini úr tí dystinum.

Virka›u sum li›

Størsta einstaka orsøkin til sigurin á H71 var, so løgi› ta› ljó›ar, at Kyndil hev›i betra li›.

Vi› hesum ver›ur meint, at Kyndil veruliga spældi sum eitt li›. Verjuparturin stó› seg til tí›ir framúr væl. Í álopinum yvirhildu menn sínar avtalur, og ikki minst, so var ta› eisini sjónligt, at leikararnir alla tí›ina bakka›u hvønn annan upp.

Hjá hoyvíkingum stó› ikki eins væl til í so máta.

Stefan Dorofte var ikki tøkur vegna ska›a, og hetta vi›førdi, at byr›arnar í alt ov stóran mun lógu á her›unum hjá Halgiri Dahl Olesen. Halgir spældi eisini ein sera gó›an dyst, og gjørdist eisini grei›ur toppskjútti hjá sínum li›i, men einsamallur kundi hann ikki lyfta H71 upp á stø›i hjá Kyndli.

Sum ta› sæst av dystarhagtølunum, so skeyt Halgir ikki færri enn 13 mál, men hetta tal kundi eins væl veri› hægri. Hev›i ta› ikki veri› fyri fyrrverandi li›felagin í kyndilsmálinum, Jens Skipagøta, kundi máltali› væl tátta› ímóti teimum 20. Serliga ta einu løtuna í seinna hálvleiki lá væl fyri hjá grøna hoyvíkinginum, og var ta› eisini um hetta mundi, at Kyndil rættiliga fekk skrykt seg leyst.

Úrmælingarnir

Sum nevnt omanfyri, so var talan hjá Kyndli um eitt satt li›avrik, men á li›um er tíbetur eisini loyvt at hava onkrar úrmælingar, og ta› hev›i Kyndil so sanniliga eisini.

Serliga tóktist Bjarni Wardum at vera í flokki fyri seg í álopspartinum. Skotini eru variera› og finturnar fleiri, so hvørki verja ella málverji megna›u at rokna út, hvat næsta trekk hansara fór at ver›a.

Harumframt tykist ta› nú eisini, sum um Jónleif Sólsker nú rættiliga er um at ver›a spældur inn á kyndilsli›i›.

Sunnudagin s‡ndi hann í fleiri førum, hví hann av mongum ver›ur rokna›ur sum besti spælskipari í landinum. Eisini sum spælst‡rari royndist hann væl, og saman vi› Una Wardum at kalla diktera›i hann, hvussu leikfer›in í dystinum skuldi vera.

Kann gerast spennandi

Ta› er helst einki dulsmál, at Kyndil eins og vanligt hevur ætlanir um at gera seg galdandi í toppinum, har ta› í løtuni er líkt til, at VÍF skal vera einaráandi.

Heilt upp á stø›i› hjá vestmenningum munnu kyndilsmenn neyvan koma í ár, men hinvegin er nógv, sum bendir á, at Kyndil væl kann gerast ein størur biti hjá hinum li›unum.

Li›i› er ein gó› blanding av yngri og meira royndum kreftum, og teir bá›ar seinastu dystirnir hava leikararnir s‡nt, at teir veruliga megna at spæla sum eitt li›, har allir strí›ast hvør fyri ø›rum. Hev›i li›i› fingi› ein ordiligan skjútta afturat Bjarna, hev›i ta› helst sæ› heilt gott út, men fyri fyrst mugu teir so klára seg uttan ein slíkan.

Hjá hoyvíkingum tykist stø›an ikki vera heilt so gó›, men sta›festast má framvegis, at ta› gongur framá, sæ› í mun til seinasta kappingarár.

Størsti trupulleikin hjá teimum er, atbreiddin í hópinum ikki er nóg stór.



Bjarni Wardum var fram um hinar úrmælingurin á kyndilsli›num. Heldur hann stílin, ver›ur hann helst at síggja ovarliga á máltindunum
Mynd: Álvur Haraldsen

Hesu fer› var hetta mest sjónligt í álopspartinum, har so at siga alt hvíldi á Halgir.

Í mun til undanfarna kappingarár er tó stór framgongd at síggja hjá H71. Enn restar naka› í, men li›i› tykist aftur vera ávegis til at gerast ein faktor í føroyskum hondbólti.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
H71: Halgir Dahl Olesen 13(3), Johnny Durhuus 3, Hallur Danielsen 3, Rolf Mouritsen 2, Anfinn N. Debes
Kyndil: Bjarni Wardum 10(3), Janus Einar Sørensen 6, Høgni Klein 4, Jónleif Sólsker 3, Uni Wardum 2, Róar Nielsen 2, Hans Áki Dal-Christiansen 1, Heini Bendtsen 1
Brotskøst: H71 4, Kyndil 3
Útvísingar: H71 2, Kyndil 4
Dómarar úr Tjaldur: Dánial Hansen og Kári Hansen. Tóktust at hava tamarhald á dystinum alla tí›ina, men ta› hev›i tó veri› ynskiligt, at spælarar vór›u revsa›ir har›ari fyri stø›uga togarí›i í verjuspælinum.



Jonleif Sólsker er her sloppin leysur av H71-verjuni, men hetta var rár hending. Heldur halt hann so longri úti á vøllinum, fyri sí›ani at spæla vi›leikarar leysar
Mynd: Álvur Haraldsen

Ræ›uligt

– Eg havi ikki or› fyri, hvussu ta› kendist hjá mær undan dystinum, men ta› var so avgjørt ikki stuttligt.

Solei›is málbar kyndilsmálverjin, Jens Skipagøta, tá vit eftir dystin spurdu hann, hvussu ta› var at spæla móti gomlu li›feløgunum.

– Me›an dysturin so gekk á, hugsa›i eg slettis ikki um ta›, sum sagt, so hev›i eg ta› ikki serliga gott undan dystinum

Fokus

Uni Wardum helt eftir dystin, at ta› er ein einstøk orsøk, sum fram um a›rar hevur vi›ført, at spæli› hjá Kyndli nú gongur betri.

– Vit fokusera meira upp á sjálvt spæli›, heldur enn at brúka tí› til at skelda dómarar og anna›. Hetta gevur eisini færri útvísingar í okkara part, solei›is at ta› ikki gerst so tungt at spæla.

– Harumframt haldi eg eisini, at spæligle›in er størri nú. Hetta gevur størri hugflog í spælinum, samanhaldi› er betri og alt í alt eru vit sum li› betri nú, enn vit vóru, tá kappingin byrja›i.

Tjaldur-KÍF 29-10 (16-8)

Nú er hugaligari



Stórskjúttin hjá Tjaldri ivast ikki í, at ta› nú ver›ur hugaligari hjá teimum í Runavíkini at venja

– Nústa›ni byrjar kappingin fyri okkara vi›komandi, heldur Sverri Justinussen. Orsøkin er fyrst og fremst n‡ggju útlendingarnir á li›num, og sunnudagin vóru hesir vi› til at tryggja Tjaldrinum fyrstu stigini

Hondbóltur
Jákup Mørk

Ta› er einki dulsmál, at byrjanin upp á kappingarári› hjá Tjaldrinum hevur veri› alt anna› enn gó›.

Felagi› hev›i annars brynja› seg út til hetta ári›, og í summar var› avtala gjørd vi› Jacob Jónsson, um at hann skuldi standa fyri venjingini í vetur.

Sum kunnugt, so var› hetta tó av ongum, og ikki fyrr enn nú tykist skil at vera komi› í hondbóltin í Runavíkini.

– Ta› var sjálvandi ein dyggur smeitur hjá okkum, tá Jacob stakk av. Vit vóru kanska ikki so nógvir, sum vandu, men eg veit at fleiri høvdu í umbúna at koma, men tá datt alt so ni›urfyri, sigur Sverri Justinussen.

– Nú hava vit so fingi› fatur á tveimum útlendskum leikarum, harav málverjin eisini hevur loki› venjaraútbúgving, so nústa›ni byrjar ári› hjá okkum.

– Enn er tó nógv, sum restar í, og kanska er ta› serliga orkan, sum skal betrast, so at stigini ver›a b‡tt í helvt eftir grundspæli›, er bert til fyrimuns hjá okkum.

Í dystinum móti KÍF sá tó ikki út til, at runavíkingarnir ikki orka›u nóg væl, og Sverri ásannar eisini, at longu nú er nógv betra› hjá teimum.

– Vit hava vant f‡ra fer› hesa vikuna, og ta› er so í øllum førum naka› spildurn‡tt hjá okkum. Ta› hava veri› einir 12-14 mans til venjingarnar, og hugurin at spæla er so avgjørt batna›ur heilt nógv.

– Dysturin móti KÍF vil eg siga var› avgjørdur í fyrra hálvleiki. Vit vunnu okkum eina trygga lei›slu hampuliga skjótt, og so var› hendan útbygd allan hálvleikin. Í seinna hálvleiki hildu vit so fast um hesa, og sigurin kom so at siga ongantí› í vanda.

– Í mun til hinar dystirnar hjá okkum haldi eg, at vit nú eru nógv ágrytnari. Menn tóktust rættiliga uppsettir, og serliga rigga›i verjuparturin væl, umframt at málverjin aftur stó› ein sera gó›an dyst.

At ta› nú ver›ur meira hugaligt at spæla hondbólt í Runavíkini, er Sverri heldur ikki í iva um.

– Vit tykjast nú at hava eitt hampuliga fast fólkagrundarlag, ísta›in fyri sum í fjør, tá li›i› so at siga var› skava› saman til hvønn dyst. Alt hetta ger sjálvandi, at hugurin at spæla nú er nógv betri, sigur Sverri Justinussen at enda.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
Tjaldur: Sverri Justinussen 9(2), Zoran Savicevic 6(5), Sveinur í Hei›unum 5, Mortan Hansen 4, Jens Martin Knudsen 3, Ken Bærendsen 1, Arnfinn Langgaard 1
KÍF: Durica Tomic 6(2), Eddie Joensen 4, Vagnur Johannesen 4, Petur Martin Johansen 3, Frí›rik Joensen 2, Sune Davidsen 1
Brotskøst: Tjaldur 11, KÍF 3
Útvísingar: Tjaldur 2, KÍF 4
Dómarar úr Neistanum: Hjalmar Petersen og Kristian Johansen

VB-VÍF 23-26 (10-13)

VÍF heldur kósina

Torføri útidysturin í Vági kasta›i tvey stig av sær, og saman vi› Stjørnuni tykjast vestmannagenturnar at hava sett kós móti ovastu tindunum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Einki er at taka seg aftur í, at VÍF kvinnurnar nú tykjast hava fingi› nokk av, at ta› bert eru menninir í bygdini, sum draga skeytlutir heim vi› sær.

Í øllum førum tykist ta› í ár solei›is, at kvinnuli›i› úr Vestmanna eisini skal hava okkurt or›i› at siga, tá hei›ursmerkini skulu b‡tast út vi› kappingarárslok. Bert eina fer› eru tær higartil í ár farnar av vøllinum uttan fulla úrtøku, men ivaleyst munnu tær eisini vera nøgdar um stigi›, sum tær fingu í Klaksvík.

Í a›rar mátar hevur úrtøkan veri› 100%, og solei›is var eisini, tá tær um vikuskifti› vóru í Vági.

VB ov stuttar

Her var talan annars ikki um nakran lættan dyst, og ta› leika›i eisini sera javnt á til tí›ir. Mi›skei›is í seinna hálvleiki fekk VÍF tó skrykt seg avgerandi leyst av mótstø›uni,

Besti málskjútti hjá VÍF var sum ikki einafer› Ioana Rapa, sum í hesum dystinum fekk sjey mál. Kanska ikki so nógv, tá hugsa› ver›ur um máltøl hennara tey bæ›i undanfarnu árini, men hinvegin er hetta eisini eitt gott tekin fyri VÍF. At ta› eisini eru a›rar á li›num, sum megna at seta bóltarnar í kassan.

Hjá VB var ta› serliga Regina Rádó, sum gjørdi um seg, men hesu fer› vóru 12 mál frá hennara sí›u ikki nóg miki›.

VB hevur nú tikist vi› hini bæ›i li›ini, sum frammanundan vór›u rokna› til favorittarnar saman vi› VB, og bá›u fer›irnar hevur úrsliti› veri› eitt tap.

Ta› var kanska væntandi, at VB fór at geva hesum li›um størri mótstø›u, men kappingin er framvegis ung, og væl kann ta› fara at henda seg, at tær úr Vági fara at gera onkran vørr seinni á árinum.

Fyri fyrst er tó líkt til, at tær fara at gerast ov stuttar.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
VB: Regina Rádó 12(6), Andrea Lütz 4, Guri› Mortensen 4, Ey›britt Krosslá 1, Maria Winther 1, Sólrun Krosslá 1
VÍF: Ioana Rápa 7(2), Soley› Mikkelsen 6(3), Randi Kúrberg 4, Frí›a Marjunardóttir 3(1), Nikolina Ey›bjørnsdóttir 3, Johanna Høgnesen 3
Brotskøst: VB 6, VÍF 8
Dómarar úr Kyndil: Hanus Kúrberg og Hans Thomassen

VÍF hevur nú leikt teir bá›ar dystirnar, sum á pappírinum tóktust torførast, og enn eru tær ósigra›ar
Mynd: Áki Bertholdsen

Stjørnan-Tjaldur 36-21 (19-10)

Stjørnan vinnur og missir

Hóast tær aftur hesa fer› kundu fegnast um tvey stig, so var lagi› ikki gott í Klaksvík sunnudagin. Aftur hesa fer› mistu tær eina av stu›ulsleikarunum

Hondbóltur
Jákup Mørk

– Nei, ta› er so heilt sikkurt, at vit hava ikki rá› til at missa enn meira fólk.

Somiki› kontantur var venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, tá vit eftir dystin móti Tjaldrinum sunnudagin fingu or›i› á hann.

Orsøkin til hetta var, at Stjørnan tí›liga í dystinum misti Annika Ljósstein, tá hendan kom skeivt ni›ur á gólvi›.

Dómurin frá læknanum var, at eini tr‡ li›bond í fótinum eru togna›, og í øllum førum kann Annika rokna vi› at vera úti í einar tríggjar vikur.

Frammanundan hevur Stjørnan eisini mist Adrianau Milodanovic, sum ikki ver›ur tøk fyribils, so breiddin hjá Klaksvíksgentunum kemur veruliga at standa sína roynd komandi dystirnar.

Júst breiddin er tó kanska meira enn naka› anna› styrkin, sum Stjørnan hevur fram um hini li›ini.

Sunnudagin tóktist í øllum førum greitt, at Tjaldur so slettis ikki hevur naka› at skula mótvegis verandi føroyameistarunum.

Endaliga úrsliti› gjørdist 36-21 til heimali›i›, og úr Klaksvík frættist, at sigurin sum einki kundi veri› væl størri.

Hjá Tjaldrinum var ta› so at siga bert n‡ggi jugoslavin, sum vísti tenn, og skeyt hon 11 av teimum 21 málunum hjá gestunum.

Ivaleyst eru vónirnar hjá Tjaldur um stig nær tengdar at avrikunum hjá n‡ggja leikaranum. Móti Stjørnuni rakk hetta ikki, og anna› var helst ikki væntandi, men nú tykist ta› í øllum førum meira sannlíkt, at Tjaldur fer at gera onkran vørr hetta kappingarári›.

Dystyurin í tølum

Málskjúttar:
Stjørnan: Anna K. Samson 10, Vesna Tomajek 8(1), Bára Skaale 5, Joan M. Joensen 5, Vesna Radovic 4, Una Olsen 3, Annika Ljósstein 1
Tjaldur: Melica Ergic 11(4), Beinta Joensen 6, Heidi Jacobsen 3, Kristine Ellingsgaard 1
Brotskøst: Stjørnan 4, Tjaldur 3
Útvísingar: Tjaldur 2
Dómarar úr H71: Kristian M. Skála og Petur S. Dahl